# At greina og tulka eina stuttsøgu

Tað er umráðandi at hava í huga, tá ið tú greinar og brúkar ein frymil, at frymilin bara er eitt hjálparamboð. Frymilin er ikki lagaður til eina ávísa søgu, tí kann tað væl vera, at ikki alt, sum er nevnt í frymlinum, er at finna í eini søgu. Brúka frymilin soleiðis, at hann hóskar júst til tína søgu og legg tað afturat, sum tú heldur, er viðkomandi fyri tína greining.

**GG**. *Minst altíð til at vísa á dømi í stuttsøguni og at grundgeva fyri tínum uppáhaldum.*

Nøkur orð og hugtøk í frymlinum eru litað *blá* og skrivað við skákskrift. Niðast í hesum skjalinum eru orðafrágreiðingar til hesi orð og hugtøk.

## Byrjan

Les søguna væl og virðiliga ígjøgnum.

- Kanna ókend orð í orðabók
- Greina fløkjasligar setningar

## Um tekstin

Greið frá tí, sum tú veitst um tekstin, so sum

- hvat slag av teksti er talan um
- hvør hevur skrivað hann
- nær hann er skrivaður og givin út
- forlagið, sum gav út

## Søgugongdin

Greið frá, hvør kjarnin í søguni er (t.e. søgugongdin stytt til fáar reglur).

## Søgubygging

Greið frá, hvussu søgan er bygd upp.

- Er søgan t.d. sett saman av brotum, skiftir hon í tíð, ella er hon í tíðarrøð (t.e. kronologisk)?
- Er søgan skipað við eini byrjan, einari miðju við hendingum og einum enda?
- Ella byrjar hon *in medias res*?
- Hvar er hæddin ella vendin í søguni?
- Er søgan long, er hent at býta hana sundur í partar og gera yvirskriftir. Eisini ber til at gera eina spenningsfarmynd, ið vísir, hvussu spenningurin í søguni er bygdur upp.

## Frásøgufólk

Er søgan skrivað í 1., 2. ella 3. persóni?

Hvør sigur hesa søguna?

Greið frá sjónarhorninum. Eru persónarnir lýstir

- innanífrá
- uttanífrá ella
- bæði?

Hvønn týdning hevur sjónarhornið fyri søguna?

## Tíðin

### Frásagnartíð

Nær er søgan skrivað?

Er søgan skrivað í nútíð ella tátíð?

### Søgutíð

Nær fara hendingarnar í søguni fram? Vís á fyribrigdi í tekstinum, sum geva grundir fyri tíni tíðarfesting.

Hvussu long er søgutíðin? Tað er tíðin, sum gongur frá søgan byrjar, og til hon endar.

Eru afturlítandi brot í søguni?

Um søgan er long, er hent at tekna eina tíðarlinju av søgugongdini.

**Lesaratíð**

Ber saman hendingar/umstøður í søgutíðini og tíðini nú og greið frá, hvat er øðrvísi nú.

Kundi henda søgan eins væl farið fram í dag? Gev grundir fyri tínum sjónarmiðum.

## Stað

Hvar fer søgan fram? Greið frá tí, sum tú veitst um staðið/støðini.

- Hvar eru persónarnir staddir?
- Verða støð nevnd við navni?
- Ella ber til at gita ígjøgnum upplýsingar, hvar søgan fer fram?

## Persónslýsingar

Lýs teir týdningarmestu persónarnar í søguni.

- Greið frá tí, sum tú veitst um teir (útsjónd, eginleikar, arbeiði, familju, fíggjarligar umstøður, samfelagsstætt o.s.fr.).
- Hvør er høvuðspersónurin?
- Hvørjir eykapersónar eru?
- Greið frá sambandinum ímillum persónarnar, um tað er viðkomandi fyri søgugongdina.

## Sosiala umhvørvið

Í summum søgum hevur sosiala umhvørvið týdning fyri stríðið í søguni.

- Hvar starvast persónarnir?
- Hvørjar stættir hoyra teir heima í?
- Hevur teirra støða í samfelagnum týdning fyri søgugongdina?
- Elvir teirra støða til stríð í søguni? Hvussu?

## Málið og skrivingarlagið

Hvussu er málið í søguni?

- Er málið gerandisligt ella háfloygt?
- Er stílurin knappur við stuttum setningum?
- Er stílurin tungur við longum og dreivutum setningum?
- Verður skift ímillum stuttar og langar setningar?
- Hvat verður serliga væl lýst (náttúra, persónar, samfelag ella annað)?
- Eru serlig málslig eyðkenni fyri skrivingarlagið?
- Hvussu er huglagið í søguni? Kanna t.d. lýsingarorðini.

## Myndamál

Eru myndamál og samanberingar í søguni? Vís á dømi í tekstinum

## Tulking og tema

Tak saman um tað, sum tín greining vísir. Vert er at geva hesum serligan ans, tá ið tú tulkar:

- Hvønn týdning hevur heitið á søguni?
- Hvørjir mótsetningar eru í søguni?
- Hvat skapar spenningin í tekstinum, og hvør er uppi ímóti hvørjum?
- Eisini kanst tú kanna, hvat persónar ella fyribrigdi umboða í søguni.
- Somuleiðis kunnu ímyndir og myndamál leiða til tulking og tema.

## Millumtekstleiki

Er nakað millumtekstasamband í søguni?

Kennir tú aðrar tekstir (yrkingar, myndir, filmir ella annað), ið viðgera sama evni? Greið frá teimum.

## Boðskapur/hugburður

Hevur søgan ein serligan boðskap til lesaran?

## Tín hugsan

Hvat heldur tú um hesa søguna? Gev grundir fyri tínum sjónarmiðum.

Er henda søgan viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?

## Orðafrágreiðingar:

*In medias res* (úr latíni): byrjar mitt í hendingunum.